## Nýggjársynski

**Rani Nolsøe, tónleikari og valevni:**

– Eg havi onki persónligt ynski, men eitt politiskt. Eg ynski, at arbeiðið hjá sjálvstýrissamgonguni, sum júst er farin frá, hevur styrkt sjálvstýrishugburðin hjá føroyingum so mikið, at arbeiðið fyri Føroya sjálvstýri kemur styrkt úr valinum tann 20. januar




# Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:

Bústaður:

Postnr.:

Bygd/býur:

Telefon nr.:

Undirskrift:

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin




*Tað varð vagga aftur og fram, tá ið sungið varð*

# Øll oyggin savnaðist

Herfyri hittust pensjonistar úr allari Suðuroynni til hugnaløtu, har tey hildu á til nakað út á náttina



*Men onki er ókeypis í hesi verð, heldur ikki hjá teimum eldru. Á hugnaløtuni seldu tey lutaseðlar við einari ørgrynnu av vinningum. Her sortera tey seðlar*



*Boð vóru eisini eftir Bunyan úr Vági og Vanja úr Hvalba til eitt lítið spæl, sum borðfútin, Torgerð Suðuroy, skipaði fyri*

JÓLAHALD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein fastur táttur í felagslívinum hjá pensjonistunum í Suðuroy hevur verið jólaveitslurnar.

Men í ár gjørdu bæði pensjonistafeløgini í oynni av at halda veitslu í felag.

Tað gjørdu tey so herfyri. Og eftir lagnum at døma, verður hetta ikki seinastu ferðina, at tey halda veitslu saman.

Tilsamans vóru næstan 100 pensjonistar úr allir oynni savnaðir á veitslu á hotellinum í Øravík og har var etið, drukkið, prátað, fortalt og dansa til nakað út á náttina.

Við borðið, sum Torgerð Suðuroy stjórnaði við hegni, varð borðreitt við fleskasteik og øllum, sum hartil hoyrir og omaná var mandlurís við mandlum og mandlugávum. Øll hundrað fingu eisini eina lítla jólagávu.

Sagt verður ofta, at har tveir føroyingar hittast, verður sungið. So tað er heldur ikki at undrast á, at tað verður sungið, har 100 føroyingar hittast og undir borðhaldinum varð sungið bæði væl og leing, onkur fortaldi eina góða og onkur hugleiddi um ymiskt.